Gravgangur eftir nýggjum bátum

Stórur áhugi er fyri at ogna sær nýggjan kappróðrarbát. Her er tað kappróðrarbáturin Tekla, sum stendur hálvliðugur

Savnsmynd

Bátasmiðurin tykist hava bíleggingar niðurfyri til komandi árið og kanska eitt sindur afturat

KAPPRÓÐRABÁTAR
Jóannes Hansen

Manningarnar, sum í ár luttaka í FM kappróðrinum eru eitt sindur færri, enn tær hva verið seinastu árini. Tær hava ofta knappast um teir tríss. Nú eru tær 48–49. Hetta kundi verið ábending um, at áhugin fyri kappróðrinum ikki er so stórur nú, sum hann hevur verið undanfarnu árini. Men tað heldur Sámal Hansen, sum seinastu fimm árini hevur smíðað flestu nýggju kappróðrarbátarnar, ikki nýtist at vera soleiðis. Og hann hevur nakað at hava sína áskoðan í.

Bátasmiðurin fær javnan fyrispurningar frá kappróðrarfeløgum, sum tosa um og kanska ætla sær at fáa nýggjankappróðrarbát og kanska nýggjar kappróðrarbátar. Um allir fyrispurningarnir, sum Sámal Hansen hesa síðstu tíðina hevur fingið, gerast til veruleika, so hevur hann nóg mikið at takast við í hvussu so er fram til næsta róðrarár og kanska eitt sindur longri enn so.

– Eg havi fingið nógvar fyrispurningar, og fleiri teirra tykjast vera rættuliga seriøsir. Viðhvørt dettur ætlanin niður fyri hjá onkrum, sum hava tókst rættuliga uppsett, meðan kappingin hevur gingið fyri seg. Tað vil altið vera soleiðis, og tí ber tað illa til hjá mær bara at siga, at tað ikki er hugsningur um hjá øðrum enn teimum, sum higartil hava ætlað sær at fáa nýggjan bát, at fáa hetta gjørt undan komandi róðrarárinum, men áhugin tykist vera stórur fyri nýggjum bátum.

Bara í einum bólki

Sámal Hansen heldur frágreiðingina upp á, at áhugin fyri nýggjum bátum nú er so stórur vera heilt nátúrliga og upplagda.

– Um vit fara 2–4 ár aftur í tíðina, so vóru fáir nýggir og nógvir lutfalsliga gamlir kappróðrarbátar. Myndin er síðani vend heilt á høvdið. Nú eru flestu bátarnir lutfalsliga nýggir, meðan tað ikki eru so nógvir eldri bátar. Fyri einum fýra árum síðani varð so at siga kappast í tveimum bólkum. Tá kappaðust nýggju bátarnir mest sum fyri seg sjálvar, og so kappaðust hinir fyri seg. Nú gongur alt fyri seg í einari kapping. Tey, sum bara hava gamlar bátar, luttaka ikki so nógv í kappingini. Tey hava heldur valt at leggja eitt ella tvey ár burtur ímillum, meðan tey bíða eftir nýggjum báti. Tí er luttøkan ikki so stór í ár, sum hon hevur verið, og tí rokni eg við, at hon so spakuliga fer at økjast aftur tey komandi árini, sigur Sámal Hansen.

Útleggingin hjá bátasmiðinum líkist ikki so lítið gongdini, soleiðis sum hon var fyri einum fjøruti árum síðani. Tá broyttist kapprógvingin soleiðis, at tað bara vóru bátar, sum vóru smíðaðir til kappróður, ið fóru at taka lut. Frammanundan hevði tað verið soleiðis, at so nógvir aðrir, enn bara teir, sum mannaðu rættuligar kappróðrarbátar, hildu seg til. Tá ið hetta slagið av bátum líka sum datt burturúr kapprógvinini, tóktist tað sum um áhugin minkaði eitt sindur. Men so vendi. Kappróðrarfeløgini fingu sær nýggjar kappróðrarbátar, og so bjóðaðu tey seg til aftur.

Eingin munur

Í summar hevur onkuntíð verið at hoyrt, at onkur, sum hevur fingið nýggjan bát fyri heilt fáum árum síðani, er farin at tosa um at skifta út aftur. Hetta kennir Sámal Hansen einki til, og hann heldur ikki, at tað hevur nakað við tað at gera, at fyritreytirnar verða betri fyri góðum úrslitum við einum báti, sum er spildur nýggjur, heldur enn við einum báti, sum er eini trý ella fýra ára gamalur:

– At tað verður tosað um at fáa nýggjan bát bendir oftast á, at tað er góður hýrur í felagnum, og at áhugin er stórur. Tað sást aftur í góðum manningum og harvið góðum úrslitum. Tað er hetta, sum ofta hevur gjørt seg galdandi, tá ið bátarnir hava verið nýggir. Um nýggju bátarnir verða sammettir við teir, ið vóru smíðaðir fyri fleiri árum síðani enn so, so er tað kanska ein munur í vektini. Mátini, sum eg havi brúkt, eru tey somum, sum Niklas í Koltri brúkti. Men tað er ikki óhugsandi, at nýggju bátarnir eru lættari, tí teir hava havt tað betri enn gomlu bátarnir, sum ikki altíð stóðu so væl um vetrarnar. Soleiðis er tað ikki longur, og tí tynglast bátarnir ikki, soleiðis sum tað sigst, at teir hava gjørð áður. Heldur ikki um teir eru nøkur ára gamlir.

Mest 5 og 6–mannafør

Tá ið vit fregnast eftir, hvat tað eru fyri bátar, sum bátasmiðurin hevur fingið fyrispurningar um at smíða, so sigur hann, at talan fyri tað mesta er um 5-mannafør og so 6–mannafør:

– Eg vænti, at dreingjabátarnir aftur fara at verða fleiri, enn teir eru í ár, og eg vænti avgjørt, at 6–mannaførini fara at gerast uppaftur fleiri, enn tey eru í ár, sjálvt um tey hava verið rættuliga mong í ár. Tað eru bara 27 ár síðani, at tað fyrstu ferð varð róð kapp við 6–mannaførum. Tá høvdu nógvar bygdir 8–mannafør. Seinni hevur tað víst seg trupult at manna 8–mannaførini, og nú kemur tað meiri enn so fyri, at tað úr bygdum, sum áður hava verið frammarlaga í kappingini millum 8–mannaførini eru fyrispurningar um at smíða teimum 6–mannafar. Tí rokni eg við, at talið á 8–mannaførum neyvan fer at økjast, kanska heldur tvørtur ímóti. Men eg rokni við, at 6–mannaførini fara at verða fleiri.

Framtíð í 10–mannaførunum

Kappingin higartil í ár hevur bara verið millum fýra 10–mannafør. Talið hevur støðugt verið lækkandi nógvu tey seinastu árini. Nýggj 10–mannafør eru fyri stuttum smíðað til Vágs, til Tvøroyrar og eisini til Klaksvíkar, men tað hevur einki sæst til hesar bátarnar í ár.

Tað eru ikki so mong ár síðani, at tað meiri enn so kom fyri, at bátatalið í 1. deildar kappingini, sum kappróðrarfólk ofta nevna kappingina millum størstu bátarnar, var tvífalt so stórt, sum tað hevur verið higartil í ár. Og Sámal Hansen, sum umframt at smíða bátar, hevur drúgvar royndir at rógva, og sum nú er stýrimaður umborð á Eysturoyingi, heldur, at vánirnar eru fyri størri luttøku, enn hon hevur verið í ár.

– Eg rokni við, at onkrir av teimum nýggju bátunum, sum ikki hava verið at sæð í ár, fara at koma aftur í aftur. Og eg rokni eisini við, at onkur annar fer at halda seg til í kappingini millum 10–mannaførini.

Hvør skuldi tað verið?

– Í síðstu viku nevndu tit hugsanina, at hoyvíkingar skuldu fara at bjóða seg fram. Eg veit einki ítøkiligt um, at teir ætla at gera tað. Men tá hugsað verður um, hvussu stór luttøkan í kappróðrinum er í Havnini og økinum har á leið, so ber væl til at ímynda sær, at onkur fer at halda seg framat og bjóða 10–mannaførunum av. Eg rokni við, at vit kunnu fara at síggja eina gongd, har tey, sum við góðum úrslitum hava roynt seg í 6–mannaførum, fara at hugsa um at manna 10–mannafar heldur enn 8–mannafar. Men nú fáa vit at síggja, hvussu tað fer at vera við hesum.

Nólsoyingur vann róðurin á jóansøku, men liggur tó næstfremst í samlaðu FM-kappingini

Mynd: Høgni Jacobsen

Nólsoyingar nýttu gulu uppskriftina

Fyri fyrstu ferð í trý ár var neyðugt við gamla siðinum, sum er, at nólsoyingar rógva um fjørðin til móttøku í Nólsoy, tá ið teir hava vunnið

10–MANNAFØR
Jóannes Hansen

Teir hava verið framvið fleiri ferðir, men tað hevur ikki eydnast. Og tá ið havt verður í huga, hvussu sannførandi Eysturoyingurin hevur verið bæði í Kollafirði og á Skálafjørðinum, so vóru vánirnar kanska ikki tær bestu hjá nólsoy-ingum, tá ið teir leygardagin settu á Trongisvágsfjørð. Men tað, sum ikki hevur eydnast hjá teimum síðani í 2000, bar hesa ferð til. Nólsoyingurin var fyrstur á mál.

Kom hetta óvart á tykkum?

– Tað kunnu vit ikki siga. Gongdin í tveimum teimum undanfarnu róðrunum segði okkum, at tað kundi bera til at vinna á Eysturoyinginum, sum hevur róð sera væl. Trupulleikin hevur verið, at teir hava fingið nógv besta startin, og at teir síðani so at siga hava stýrt allari kappingini. Tað høvdu vit sett okkum fyri at gera nakað við, og tað eydnaðist, sigur Nicolaj Falck. Hann er bátsformaður umborð á Nólsoyninginum.

Hvat gjørdu tit øðrvísi hesa ferð, enn tit hava gjørt undanfarnu ferðirnar?

– Í venjingunum undan Jóansøkuni gjørdu vit nógv við at venja startin. Vit kunnu siga, at vit løgdu okkum eftir somu uppskriftini, sum teir umborð á Eysturoyingi hava dugað so væl at gjørt nýtslu av undanfarnu ferðirnar. Hesa ferð fingu vit ágóðan av henni.

Hvat sigur henda uppskriftin?

– Tað er einki loyndarmál. Tað ræður um at fáa besta startin. Um tað eydnast, so er tað lættari at stýra kappingini. Starturin hjá okkum hesa ferð var hampuliga góður. Vit kappaðust eina løtu við allar hinar bátarnar. Men Vestmenningur og Havnarbáturin duttu skjótt eitt sindur afturum. So var at halda eyguni við Eysturoyinginum, og tað eydnaðist at halda honum aftanfyri okkum.

Nær vóru tit fullvísir í, at hetta fór at eydnast?

– Ikki fyrrenn teir høvdu skotið fyri okkum. Tá vistu vit, at vit vóru komnir á mál eina bátslongd frammanfyri Eysturoyingin. Men vit kendu á okkum mest sum allan teinin, at tað vóru vit, sum hesa ferð stýrdu kappingini, og tað bar eyka styrkina við sær, sum er so sera týdningarmikil, og sum vit í undanfarnu kappingunum hava kent á okkum hevur verið umborð á Eysturoyinginum.

Tá ið tað nærkaðist málinum fór Eysturoyingurin fyrst undir endaspurtin. Tað tóktist sum um, at munurin millum bátarnar minkaði so mikið, at tað ikki var heilt leyst. Men so svaraðu teir umborð á Nólsoyinginum kundu havt mannað bátin í Nólsoy, men tríggir, sum vóru við fyri trimum árum síðani, hildu seg ikki til í ár, so vit hava fingið eitt sindur av hjálp aðra staðni frá, sigur bátsformaðurin á Nólsoyingi.

Manningin arbeiðir í Havnini, so har stendur báturin, og teir venja á Havnarvág.

Rokna tit við møguleikanum at vinna FM?

– Munurin fram til Eysturoyingin er bara trý stig, so tað er upp til okkum sjálvar at gera av, um vit skulu verða meistarar ella ikki. Men í tveimum teimum síðstu kappingunum – í Sandavági og á Ólavsøku – kann alt koma fyri, sigur Nikolaj Falck, sum minnist aftur á 2000, tá ið tað var stórt vónbrot fyri teir, at tað ikki eydnaðist at vinna FM. Tað høvdu teir møguleika at tryggja sær á Ólavsøku, men tá kiksaði, og Vestmenningurin gjørdist meistari.

Í áttati árunum var Nólsoyingurin sera stinnur. Teir vunnu FM seks ferðir, men Nólsoyingurin hevur ikki vunnið FM síðani í 1989. Manningin, sum nú stríðist fyri at vinna fyrsta meistaraskapin í fjúrtan ár, er henda: Hans Jacob Jacobsen – Høgni Niclasen, Raidar Jacobsen, Nicolaj Falck, Roy Poulsen, Thomas Hjaltalin, Jakku Guttesen, Asbjørn Olsen, Brian Hansen, Thomas Joensen og Aksel Joensen. Elsti maðurin er 29 og tann yngsti er 19 ára gamalur.

Tríggir hava FM heitið stutt frammanfyri stavn

Góðir møguleikar eru fyri, at tríggjar manningar hjá Havnar Róðrarfelag leygardagin fara at vinna FM heitið, meðan tær tríggjar kappingarnar, har tað leygardagin var nýggjur vinnari, í hvussu so er ikki verða avgjørdar fyrrenn í Sandavági

FM KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen

Kappróðrarárið er meiri enn hálvrunnið. Fjórða av teimum sjey FM kappingunum var leygardagin á Jóansøkuni á Tvøroyri. Í trimum av teimum seks kappingunum vóru vinnarar, sum ikki hava verið fyrstir á mál fyrr í ár. Nólsoyingurin vann 10–mannafararóðurin, Jarnbardur vann kappingina millum 6–mannafør við monnum, og Havfrúgvin úr Vestmanna við dreingjamanning syrgdi fyri, at tað aftur hesa ferð var ein vinnari uttanfyri Suðurstreymoyar valdømi.

Enn er eingin FM vinnari funnin. Men tað er heilt nógv, sum bendir á, at í hvussu so er ein og kanska tveir meistarar fara at verða kjósaðir í Fuglafirði nú leygardagin. Tvær manningar hava higartil verið einaráðandi í sínum kappingum. Tær eru báðar úr Havnar Róðrarfelag, sum er størsta og mest vinnandi felagnum í landinum.

8–mannafarið Ørvur og 6–mannafarið Gongurólvur við kvinnumanning hava vunnið allar fýra ferðirnar. Ørvur er undan Varmakeldustevnuni fimm stig frammanfyri Argjabátin, og Gongurólvur er tíggju stig undan Páll Fanga. Um gongdin leygardagin verður, sum hon hevur verið higartil í ár, so fara kvinnurnar umborð á Gongurólvi eftir kappingina leygardagin at vera tólv stig frammanfyri næstu kappingarneytarnar, meðan Ørvur fer at verða í hvussu so er sjey stig undan teimum næstu.

Teinarnir

Í Fuglafirði fer at verða kappast á øllum trimum teinunum. Hetta verður síðsta ferðin í ár, at tað fer at verða kappast á 1500 og 2000 metrum. Tvær tær síðstu kappingarnar fara at verða í Sandavági 12. juli og so í Havnini ólavsøkuaftan. Í hesum kappingunum fara allir seks róðrarnir at ganga fyri seg á styttsta teininum.

Millum róðrarfólk verður mett, at tað kann fara at hava ávirkan á úrslitini í kappingini millum 6–mannaførini við monnum, 8–mannaførini og 10–mannaførini, at tað ikki fer at verða kappast á longru teinunum. Tað er tó lítið sannlíkt, at stutti róðrarteinurin á nakran hátt fer at skala 8–mannafarið Ørv, ið hevur verið mest sannførandi vinnarin av øllum í ár.

Bæði í kappingini millum 6–mannafør við monnum og 10–mannaførini hava tríggir vinnarar verið í teimum fýra kappingunum, sum higartil hava verið. Á Norðoyastevnu vann Havnarbáturin kappingina millum 10–mannaførini, sum ta ferðina var á 1500 metrum.